# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Fólksins herur fer at forða øllum royndum hjá Taiwan at staðfesta sítt sjálvræði*

*(kinesiskur generalur).*

# Kina hóttir Taiwan við hermegi



*Fleiri túsund fólk taka undir við hugskotinum hjá forsetanum um at staðfesta sjálvræði landsins, hóast kinesararnir siga nei*

**Kinesarar eru í øðini inn á taiwanska forsetan, sum vil hava taiwanska sjálvræðið staðfest. Eitt tílíkt stig verður steðgað, siga kinesarar**

Taiwan hevur havt sjálvræði síðani borgarakríggið í 1949, men kinesiska leiðslan heldur uppá, at Taiwan framvegis er ein partur av Kina, og at Taiwan verður lagt afturat kinesiska ríkinum fyrr ella seinni.

Nú prutlar av álvara undir lokinum í Taiwan-sundinum, eftir at taiwanski forsetin, Chen Shui-bian, í einari røðu sunnudagin segði, at Taiwan eigur at staðfesta sítt sjálvræði, at tað almenna navnið Lýðveldið Kina skal broytast til Taiwan, og at landið eigur at fáa nýggja grundlóg. Í gjár endurtók forsetin hugsan sína:

– Taiwan vil hava sjálvræði, Taiwan vil hava annað navn, Taiwan vil hava nýggja grundlóg, og Taiwan vil hava menning, segði Chen Shui-bian í einari røðu fyri handilsmonnum í gjár.

### Eingin broyting

Sjónarmiðini hjá taiwanska forsetanum fella ikki í góða jørð inni á kinesiska meginlandinum. Generalurinn Guo Boxiong, ið verður hildin at vera tann ovasti generalurin í kinesisku hermegini, segði í gjár, at fólkins herur fer at forða øllum royndum hjá Taiwan at broyta verandi støðu.

Sunnudagin kunngjørdi kinesiska stjórnin, at hon hevur økt útreiðslurnar til hernaðarmál næstan 18 prosent, og at støðan viðvíkjandi Taiwan er ein orsøk til tann stóra vøksturin.

Taiwanar svaraðu alt fyri eitt við at royndarskjóta eina rakett, sum ber 600 kilometrar. Tað merkir, at hon kann røkka málum inni á kinesiska meginlandinum, um hon verður skotin út frá einum herskipi, skrivar AP.

Eygleiðarar í Taiwan siga, at Chen Shui-bian, forseti, hevur valt at leggja dent á taiwanskt sjálvræði sum lið í valstríðnum upp undir tjóðartingsvalið síðst í hesum árinum og forsetavalið í mars næsta ár.

Summir eygleiðarar halda, at forsetin tekur málið upp nú fyri at benda kjakinum frá einari korrupsjónsgølu í hansara egna húsi. Løgreglan hevur skuldsett konu forsetans fyri svik, og versonur teirra er dømdur fyri svik. Harafturat er forsetin skuldsettur fyri at hava misbrúkt almennar pengar, men lógin forðar fyri, ákæra kann reisast ímóti honum.

Amerikanska stjórnin er ikki fegin um orðalagið hjá taiwanska forsetanum.

– Hasum kemur einki burturúr, og vit taka ikki undir við tí, sigur Sean McCormack, talsmaður hjá uttanríkisráðnum í Washington.

# Mannarættindi framvegis lítið vird í Irak

**Tað eru ikki bara uppreistrarmenninir, sum traðka mannarættindini undir fót**

Í einari frágreiðing hjá amerikanska uttanríkisráðnum verður staðfest, at enn er langt á mál, áðrenn Irak lýkur reglurnar um altjóða mannarættindi. Sagt verður, at harðskapurin ímillum teir ávísu fólkabólkarnar forðar fyri nøkrum bata á mannarættindaøkinum, men lagt verður afturat, at tað eru kortini ikki bara uppreistrarmenninir, sum bróta reglurnar.

– Innanríkis- og verjumálaráðið í Bagdad hava ábyrgdina av, at fangar verða bukaðir, fáa elektriskan stoyt ella eru fyri kynsligum ágangi, stendur í frágreiðingini hjá uttanríkisráðnum í Washington.

Tey seinastu árini hevur USA brúkt meiri enn eina mia. dollarar til átøk í Irak, sum skuldu fremja demokrati og mannarættindi. Harafturat eru ein hálv mia. dollarar brúktir í Afghanistan til sama endamál.

Barry Lowenkron, varauttanríkisráðharri, sigur, at framstig hava verið í Afghanistan, síðani Taliban fall, men at tað eisini er langt eftir á mál har.

## STUTT SAGT

### Howard í trupulleikum

Var tjóðartingsval í Avstralia í dag, hevði arbeiðaraflokkurin vunnið stjórnarvaldið frá mið-høgrastjórnini hjá John Howard, forsætisráðharra. Ein meiningakanning hjá blaðnum The Australian vísir, at 57 prosent av veljarunum høvdu atkvøtt fyri arbeiðaraflokkinum. So stóra undirtøku hevur arbeiðaraflokkurin ikki havt síðani 1993. Eygleiðarar siga, at tað eru tvinnar orsøkir til framgongdina. Onnur er tann nýggi floksformaðurin, Kevin Rudd, og hin er lyfti floksins um at taka teir avstralsku hermenninar úr Irak, fær arbeiðaraflokkurin valdið.

### Kvinnur eitraðrar

Tvær amerikanskar kvinnur, móður og dóttur, liggja á einum sjúkrahúsið í Moskva, har tær verða viðgjørdar fyri eitran. Sambært russiskum fjølmiðlum er støðan hjá kvinnunum álvarssom. Tær búðu á einum hotelli í Moskva, men tann 24. februar gjørdust tær sjúkar og vórðu fluttar á sjúkrahús. Har staðfestu læknarnir, at kvinnurnar vóru eitraðar við evninum thallium. Tað var eisini tað fyrsta evnið, sum illgruni var um, tá fyrrverandi russiski agenturin Alexander Litvinenko doyði av eitran í november. Tað vísti seg tó seinni, at hann var vorðin eitraður við evninum polonium.

### Bacardi vil hava Absolut

Absolut Vodka verður í dag roknað sum eitt av teimum best kendu svensku vørumerkjunum, men nú bendir nógv á, at navnið fer á útlendskar hendur. Tann borgarliga stjórnin hevur sett sær fyri at einskilja nakrar almennar fyritøkur, og millum teirra er fytitøkan Vin & Sprit AB, sum ger Absolut Vodka. Fyrsti keyparin hevur longu gjørt vart við seg. Tað er Bacardi-samtakið, sum hevur høvuðsstøð á Bermuda, og sum er heimsins størsti privati rúsdrekkaframleiðari. Umframt rom ger fyritøkan millum annað gin, whisky, vodka, tequila.